# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Ein stór vika

Farna vika var ein stór ítróttarvika hjá føroyingum. Luttøkan á Oyggjaleikunum á Álandi setti dagsskránna í Føroyum og Føroyar á breddan aðrastaðni. Tað var vorðið sum luttøka. Ongantíð áður hava føroysk itróttarfólk vunnið so nógv heiðursmerki á Oyggjaleikum, og Føroyar gjørdust mest vinnandi oyggjalandið á leikunum hesaferð.

Føroyar eru væl minni enn størstu oyggjasamfeløgini, sum taka lut á Oyggjaleikunum, og Føroyar eru nakað størri enn tey minstu. Millum stóru oyggjarnar, ið eru við á Oyggjaleikum, verða Føroyar mettar sum ein av minnu oyggjunum, og tí er tað undrunarvert, at Føroyar kunnu vinna Oyggjaleikirnar samanlagt – halda tey í øllum førum.

Vit vita, at vit eiga nógv dugnalig ítróttarfólk í Føroyum, og tá hugsað verður um tað stóra sjálvbodna arbeiðið í ítróttinum, so vita vit eisini, at grundarlagið, vit standa á, er sterkt. Men frá tí breiða grundarlagnum er neyðugt at arbeiða víðari. Vit skulu menna ítróttarfólkini í teirra ítrótti, spesialisera tey og venja tey í toppform. Tá fáa vit úrslit, sum vit sóu á Oyggjaleikunum. Og tá vit fáa slík úrslit, styrkja vit eisini breiddina og áhugan fyri ítróttinum.

Oyggjaleikavikan kann verða ein stórur íblástur fyri føroyskan ítrótt. Svimjarar, flogbóltsspælarar, badmintonspælarar, fimleikarar, judomenn og onnur hava víst, at tað ber til at kappast við hini 24 oyggjarnar, sum luttaka á Oyggjaleikunum, og vit hava øll sæð, hvussu stór gleðin er, tá ið fólk taka eitt stig fram ímóti sigrinum ella eftir drúgva kapping kunnu lata seg heiðra sum vinnarar.

Nú Oyggjaleikirnir eru farnir aftur um, mugu ítróttargreinararnar ikki leggja seg at hvíla og njóta farin avrik. Nú mugu gyltu løturnar á Álandi brúkast til at koma enn longur á leið, og onkrar ítróttargreinar, sum framvegis ikki eru millum tær bestu á leikunum, mugu seta sær sum mál at gera tað betur næstu ferð og næstu ferð.

**Sosialurin**

## Navigator/Næraberg verkætlanin



**JÓANNES EIDESGAARD**
floksformaður

Seinastu tíðina hevur ivi verið sáddur um, hvørja støðu Javnaðarflokkurin hevur til eina nýggja verkætlan viðvíkjandi Navigator/Næraberg sum Hanus Hansen hevur søkt fiskimálaráðið um loyvið at fremja. Ført hevur verið fram, at flokkurin beinleiðis hevur verið ein forðing fyri at henda verkætlan kan gerast veruleiki.

Hetta vil Javnaðarflokkurin staðiliga vísa aftur, og fyri at gera hetta púra greitt hava vit skrivliga boða løgmanni og fiskimálaráðharranum frá hesum.

Ført hevur verið fram, at Fiskimálaráðið vil eftirlíka eini umsóknin frá Hanus Hansen reiðara, men at Javnaðarflokkurin liggur í buktini. Tað er onki sum forðar Jacob Vestergaard ið at geva einum reiðari eitt loyvi tá ið tað, sum í hesum føri, liggur eitt greitt tilmæli um hetta frá umsitingini hjá landstýrismanninum.

Sjálvsagt kann ein avgerð altíð viðføra politisk tjak og politiskar ósemjur. Flokkurin hevur í fleiri umførum m.a á fundi í lítlu samgongu fyri mánum síðani gjørt greitt, at tað ikki fór at hava politiskar avleiðingar fyri landstýrismannin, um hann avgreiddi málið.

Hóast hesa fráboðannir, so er onki hent í málinum. Fyri at Javnaðarflokkurin ikki skal verða brúktur sum umberðing fyri at avgreiða málið, hava vit tann 3 juli 2009, enn einaferð gjørt fiskimálaráðharranum og løgmanni hetta greitt í skrivið ið er sent teimum. Hetta er gjørt fyri at undanførðslan, at Javnaðarflokkurin forðar málinum, ikki kann nýtast longur.

Vit hava tó víst á eitt stórt ivasemi um at geva frítt til at skifta ídnaðarskip út, enntá uttan støddaravmarkingar. Hetta skal síggjast í ljósinum av, at fyri nøkrum fáum árum síðani samtykti Løgtingið at gjalda milliónauppræddir fyri at fáa henda partin av flotanum út av grunnunum. Tí kann tað tykjast løgið, at Fiskimálaráðið í dag sigur, at hetta er neyðugt, um ein nýggj Navigator-ætlan kann síggja dagsins ljós. Fiskimálaráðið hevur somu møguleikar sum onnur ráð at fáa sær lógligar heimildir til vega gjøgnum Føroya Løgting, um hetta er neyðugt til tess at fremja eina politiska ætlan.

Javnaðarflokkurin tók dyggiliga undir við fyrstu Navigator-ætlanini og flokkurin leggur ikki hólmstrá í vegin fyri, at ein nýggja ætlan av slíkum slag verður reist.

## Har var rumbul á tinginum



**SÓLVIT NOLSØ, NEWCASTLE**
lesandi

**Hans Pauli Strøm burdi lagt frá sær, eftir at málið um meirnýtslu er komið fram. Um ikki annað so fyri frið skyld**

Eingin skal ivast í endamálinum hjá Tjóveldi, sum er at skapa rumbul og rista grundarlagið undir samgonguni. Um tað er kláreð, skal eg ikki meta um, men úteftir haldi eg, at samgongan hevur klárað seg væl, og eingin loysn er tikin í óðum verki, sum ein kanska hevði angrað seinni. Tað er eisini gott, tí støðan krevur umhugsan.

Trupulleikin, sum er komin fram er ikki nýggjur. Sum flest øll hava skilt, so er henda mannagongd ikki ein, sum bert Hans Pauli Strøm og hansara ráð hevur nýtt. Hans Pauli Strøm hevur sjálvur víst á, at ikki bert hann hevur brúkt ov nógv, men eisini fleiri onnur landsstýrisfólk. Oddagreinin hjá Dimmalætting 03.07.09 kallar hesa sokallaðu undanførslu eitt demokratiskt undirskot, sum ræður í okkara samfelag. Tað er bæði rætt og ikki. Tað er rætt, tí tað vísir seg aftur og aftur, at fólk, ið sita við valdi, gera eitthvørt umaftur, um tað riggaði fyrstu ferð, og síðani fær mann kavabóltsstøðuna, har bólturin bara verður størri og størri. Tað, sum skal til fyri at steðga bóltinum, er eitt brak, og soleiðis endar tað ofta. Í Bretlandi hava fleiri sakir koyrt í seinastuni, tí limir í bretska parlamentinum hava brúkt ov nógvar pengar uppá teirra bústað í London, sum tey hava keypt, av tí at tey búgva ov langt frá arbeiðsplássinum, sum er parlamentið. Tey høvdu nýtt ov nógv einaferð, og síðani rullaði tað. Har endaði alt við einum braki, og fleiri stilla ikki upp aftur, og onkur er koyrdur frá. Sigast skal, at allir peningurin, ið er nýttur, kemur úr lummanum hjá skattgjaldarum. Men Dimmalætting fer eisini skeiv tá hon kallar hesa støðu eitt dømi um demokratiskt undirskot. Tað, at vit hava eina skipan, ið kann nýtast til at rætta hesi fólk eftir, stýrisskipanarlógin, boðar frá einum demokratiskum landi. At niðurstøðan hjá landsstýrismálanevndini kann rættvísgerast útfrá stýrisskipanarlógini, og at tað kann fáa fylgir fyri tann, ið hevur framt brotið er tekin uppá fólkaræði, ið riggar sum tað skal. Tað, ið manglar er nokk neyvari eftirlit við nýtsluni hjá landsstýrisfólkunum.

Men fyri at koma aftur til tað ítøkiliga málið, so er nokk frægast, at Hans Pauli Strøm leggur frá sær. Arbeiðsfriður verður ikki aftur fyrrenn tá. Eg ivist ikki í, at Hans Pauli kann røkja sínar skyldur sum landsstýrismaður líka væl, sum nakar annar, men hann hevur tíverri fingið høvdið á blokkin. Veljarin kann missa álitið á samgonguni, um ikki okkurt hendir. Vit, sum velja, mugu vita, at um okkurt skeivt er farið fram, so eigur tað at fáa fylgjur. So hetta mál kann verða nýtt sum dømi uppá mót, og at samgongan torir at taka torførar avgerðir, og síðani kunnu vit fara víðari. Tað, ið kann henda, um eingin avgerð verður tikin í hesum máli, er, at Tjóveldi fer at rópa harðari, enn teir gera nú, og teir eru so troyttandi at lurta eftir, at tað hevði kanska verði verri enn núverandi støða.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.